umhvørvisstovan

SKÁLAVÍKAR KOMMUNA
GERÐISVEGUR 13
220 SKÁLAVÍK
FØROYAR

Argir hin 15. juli 2011
Málsnr.: 11/00024-10
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Heidi Hansen

**Viðvíkjandi: Spillivatnsætlanin hjá Skálavíkar kommunu er góðkend**

Við hesum skal verða boðað frá, at Umhvørvisstovan hin 15.07.2011, sambært § 18, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 4, stk. 2 í kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn, hevur góðkent spillivatnsætlanina hjá Skálavíkar kommunu fyri tíðarskeiðið 2011-2015.

Umhvørvisstovan fekk hin 29.12.2010 spillivatnsætlanina til góðkenningar frá Skálavíkar kommunu (mál nr. 11/00024-1). Í sambandi við viðgerðina av ætlanini, hevur Umhvørvisstovan verið í samband við kommununa, og 07.07.2011 varð dagførd ætlan send Umhvørvisstovuni til góðkenningar (mál nr. 11/00024-9).

Út frá eini heildarmeting av upplýsingunum í spillivatnsætlanini, ið varð send 07.07.2011, verður mett, at komandi spillivatnsskipan í kommununi lýkur ásetingarnar í §§ 8-13 í kunngerðini um spillivatn. Hetta merkir, at spillivatnsætlanin m.a. fevnir um spillivatn frá øllum húsarhaldum, virkjum og virksemi í kommununi, og at spillivatnið eftir reinsing verður leitt gjøgnum lokaða skipan beinleiðis á sjógv við góðum vatnskifti.

Spillivatnsútleiðingarnar í Skálavíkar kommunu liggja uttanfyri bátahylin, men innanfyri brimgarðin. Orsøkin til at útleiðingarnar liggja innanfyri brimgarðin, er tí at har er so nógv brim, og er vandi fyri at leiðingarnar brotna. Skálavíkar kommuna nevnir í ætlanini, at tey meta ikki, at vandi er fyri at spillivatn savnast innanfyri brimgarðin, tí har er sera gott vatnskifti í víkini.

Góðkenningin umfatar einans krøv ásett í spillivatnskunngerðini, tvs. tann umhvørvisliga partin av spillivatnsætlanini. Góðkenningin tekur ikki støðu til hvørjar tekniskar loysnir eru valdar og um teknisku viðurskiftini sum heild eru í lagi, so sum dimensioneringin o.s.fr. Hetta er ábyrgdin hjá kommununi.

Um tað seinni vísir seg, at spillivatnsskipanin elvir til dálking, t.d. uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum, skal kommunan, sambært §

10, stk. 3 í kunngerðini um spillivatn, fremja bøtandi atgerðir, so sum økta reinsing ella føra spillivatnið longur út.

Vinaliga

Anni á Hædd, stjóri

Heidi Hansen, umhvørvisviðgeri

umhvørvisstovan Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01· us@us.fo · www.us.fo